# Mentamálaráðið
MENTAMÁLADEILDIN

## Fulltrúi til Mentamáladeildina

sansir.fo

**Starvið**
Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum, ágrýtnum og engasjeraðum fulltrúa til Mentamáladeildina. Starvið verður at seta skjótast til ber.

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a. at:
- fyrisita, tryggja menning og samstarv, at røkja samskiftið við lærustovnar og øki undir Mentamáladeildini, og at taka sær av málsviðgerð í hesum sambandi,
- fyrisita og menna gransking og hægri útbúgvingar,
- ráðgeva og vegleiða í spurningum innan gransking og hægri útbúgving, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.,
- fremja samstarv við vinnulívið o.o., ið varða av økinum,
- taka lut í verkætlanum, her ímillum eisini verkætlanarleiðslu, og
- røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur.

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar
- hava útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving,
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt umframt samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- eru tænastusinnaðir, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- hava førleika at menna samstarvið við vinnulívið og áhugafelagsskapir
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
Innan økið eru fleiri spennandi avbjóðingar, sum fulltrúin kemur at fáa ávirkan á. M.a. verður arbeitt við at dagføra, menna og samskipa hægri útbúgvingar og gransking.

Starvið er áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skal sendast til:

Mentamálaráðið
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. januar 2007, kl. 12.00.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, á tlf. 355035 ella á 555035.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
Í aðalskrivstovuni eru stápsfunksjónir innan m.a. løgfrøði, búskap, HR, Kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin í Mentamálaráðnum er býtt í 3 deildir – Fólkaskúladeild, Vinnu- og miðnámsskúladeild og Mentamáladeild – sum stápsfunksjónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.
Økið hjá **Mentamáladeildini**: Hægri útbúgving og gransking, kirkjumál, mentan og list, siðsøguligu søvnini, fjølmiðlar, børn og ung, ítrótt, norðurlendskt mentanarsamstarv o.a..

VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

# Pedagogar

Vøggustovan á Konmansmýru søkir eftir 2 pedagogum at starvast 30 tímar um vikuna. Størvini verða sett 01.03.2007 (ella eftir avtalu).

Lønin er sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Vøggustovan er ein sjálvsognarstovnur við 35 børn í aldrinum 1 til 3 ár. Vit hava 3 stovur og 4 starvsfólk á hvørjari stovu.

**Krøvini til tín eru:**
- At tú ert fyrikomandi og erligur.
- At tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- At tú heldur at arbeiði í einari vøggustovu er spennandi og avbjóðandi.
- At tú dugir at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar.
- At tú er nærverandi og dugir at lurta.
- At tú vil verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí vit seta okkum fyri.

Vit bjóða eitt áhugavert starv, har tú sleppur at verða við til at mynda títt egna arbeiði og gerandisdagin hjá børnunum. Vit liggja í einum spennandi umhvørvi tætt við Hoyvíkstjørn og sniggøtunum á Konmansmýru.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Katrin Bjarnadóttir ella álitisfólkinum Jóhannu Laksá á telefon 313131.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinast 01.02.2007.

**Vøggustovan á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO – 100 Tórshavn

# Mentamálaráðið

## Tvey størv til ES granskingarsamstarv

Tvey størv til ES granskingarsamstarv í Granskingarráðnum eru leys at søkja.

Umsóknarfreistin er fríggjadagin 26. januar 2007, kl. 12.00.

Meira fæst at vita á heimasíðu Mentamálaráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum "leys størv") og hjá Granskingarráðnum: www.gransking.fo

**Mentamálaráðið**

# Barna- og ungdómsdagar
## í endurnýtsluhandlinum IKTYS
*(gamla Køkubúðin)*

Av tí at fólk hava latið okkum so nógv góð klæði, eins og hópin av bamsum og øðrum leikum, halda vit barna- bamsu- og ungdómsdagar frá týsdegnum 09.01.07 til og við leygardagin 20.01.07, ella so leingi vøran røkkur.

*Iktys, N. Winthersgøta 9, Tórshavn*

# veitst tú ikki tað?
Sosialurin